# Eingin nýggjur dagur ásettur

**Málið um lýsingar hjá Club 20 má bíða eina tíð enn, áðrenn tað kemur fyri rættin**

*Enn má bíðast við spenningi eftir nýggjum rættarfundi, áðrenn greiða kann fáast, hvørji orð kunnu nýtast í lýsingum í føroyskum fjølmiðlum, tá tað snýr seg um rúsdrekka*




RÆTTARMÀL

*Heri á Røgvi*

Rættarmálið millum Club 20 og ákæruvaldið var fyri í Føroya rætti í seinastu viku. Málið fekk tó ikki nakra drúgva viðgerð í rættinum, tí dómarin vildi kalla tvey nýggj vitni í málinum.

Tað snýr seg um tveir pensjóneraðar løgreglumenn, sum dómarin metti hava týdning fyri málið. Orsøkin er tann, at hesir, meðan teir enn arbeiddu fyri løgregluna, høvdu regluligar fundir við leiðsluna í Club 20. Har varð gjørt greitt, hvat Club 20 kundi loyva sær at lýsa við.

Teir báðir løgreglumenninir skulu innkallast av rættinum, men enn er ikki greitt nær næsti rættarfundurin verður.

Toni Dam, stjóri fyri Club 20, sigur, at enn restar største parturin av málinum í at verða viðgjørdur í Føroya rætti. Hann sigur seg rokna við einum drúgvum rættarmáli.

Ákæran hjá fútanum móti Club 20 – rættari sagt partafelagið, ið eigur Club 20 – snýr seg um lýsingar fyri rúsdrekka við fráboðanum sum »Double Up« og sølu í barrini, sum fútin metir ikki eru loyvdar sambært rúsdrekkalógini. Leiðslan í Club 20 metir als ikki, at teir hava lýst við rúsdrekka. Men heldur, at teir hava lýst fyri sjálvari barrini, sum eisini selur annað enn rúsdrekka.

Fríggjadagin var málið um lýsingina hjá Restorffs bryggjaríi fyri í Føroya rætti. Í tí málinum verður dómur sagdur fríggjdagin kl. 12.

## Sendistovan í Bretlandi bjóðar vinnutænastur

**Nýggja føroyska sendistovan í London bjóðar, í samstarvi við Danmarks Eksportråd, ávísar tænastur, sum kunnu gagna vinnulívinum**

**Tìðindaskriv**

Í tíðindaskrivi frá nýggju sendistovu Føroya í Bretlandi verður sagt, at stovan hevur tikið upp samstarv við Danmarks Eksportråd í London. Hetta merkir at sendistovan kann bjóða føroyska vinnulívinum ráðgeving um, hvussu føroyskar fyritøkur kunnu styrkja sína støðu á bretska marknaðinum. Til ber hjá føroyskum fyritøkum at fáa størri ella smærri uppgávur gjørdar. Sum dømir verða nevndar:

- marknaðarkanningar
- fáa samband við møguligar kundar ella agentar
- meta um kappingarføri
- senda út presetiatiónsskriv ella faldarar
- fáa fundir í lag
- ráðgeving um stovnsetan av dóttirfeløgum í Bretlandi

Eisini kunnu føroyskar fyritøkur fáa upplýsningar um bretskar veitarar av vørum og tænastum.

Adressan hjá sendistovuni í Bretlandi er:
Sendistova Føroya í Bretlandi
55 Sloane Street
London SW1X 9SR
United Kingdom
Tlf +44 20 7333 0227
Fax +44 20 7333 6706
Teldupostur:
faroes.mission.uk@tinganes.fo

Umsitingarliga er nýggja sendistovan í London ein deild undir Løgmansskrivstovuni. Og tað er fyrrverandi løgmansskrivarin John Rajani, sum er sendimaður Føroya í Bretlandi.

## Gittarkonsert í Listaskálanum

**Tíðindaskriv**

Sunnudagin 3. november kl. 16. fer ungi føroyski gittarleikarin Ragnar Olsen at hava konsert í Listaskálnum í Havn.

Á skránni verður m.a. spanskur og suðuramerikanskur tónleikur fyri sologittara.

Ragnar Olsen hevur seinastu 4 árini lisið á tónlistarskúlanum í Esbjerg og fer til Finlands komandi ár at nema sær kunnleika hjá Timo Korhonen, professara á Sibelius Akademiinum.

Ragnar er føddur og uppvaksin í Skopun og byrjaði sum 13 ára gamal at spæla gittar. Hann hevur umframt lesnaðin á luttikið á skeiðum hjá John Mills, og hevur hann eisini verið í Spania, har hann hevur nomið sær enn meira kunnleika í gittarspæli.

Konsertin verður sunnudagin kl. 16.00 í Mykinessalinum, ið sigst at vera serstakliga vælegnaður til gittarkonsertir.

# Frysta blokkin



*Karsten Hansen hevur saman við løgmanni endaliga staðfest við danskar myndugleikar, at heildarveitingin úr Danmark verður fastfryst næstu fýra árini.*

Fíggjarmálaráðharrarnir í Danmark og Føroyar hava gjørt avtalu, at blokkstuðulin úr Danmark næstu fýra árini verður 615,5 mó. Hetta er ein staðfesting av tí politikki, sum verandi samgongu hevur sett sær fyri at reka.

Blokkurin varð skerdur við 366 milliónum av fráfarandi samgonuni, men vilji var ikki til staðar í samgonguni at lækka heildarveitingina enn meira.

Nógvur kritikkur er rættaður móti fráfarnu samgongu fyri at skera so nógv av blokkinum í einum, men landsstýrið hevur mett niðurskurðin hava stóran týdning í royndunum at vinna Føroyum størri sjálvbjargni.

Við at frysta blokkin fastan, so roynir samgongan at minka um virðið á blokkinum við atliti at prístals- og búskaparvøkstrinum næstu árini.



# Tíðarhóskandi høli til ølið

**Føroya Bjór betrar um tænastuna í høvuðsstaðnum við nýggjari sølubúð**

VØRUR

*Jan Müller*




*Nýtt og gamalt møtast í spildurnýggju sølubúðini hjá Føroya Bjór í Akranesgøtu*

*Mynd Jens K. Vang*

Annað av føroysku bryggjaríunum, Føroya Bjór, hevur nú tikið eitt týðandi stig á leiðini at betra um sína kundatænastu. Rúmligt og snotuligt avgreiðsluhøli og sølubúð er bygt upp í verandi goymslubygning í Akranesgøtu . Á samkomu í nýggju hølunum týsdagin takkaði stjórin í Føroya Bjór, Einar Waag felagnum Byggitekk og tess fólki fyri eitt væl úr hondum greitt arbeiði. Hann takkaði eisini viðskiftafólki og starvfólki fyri at hava havt gott tol, nú útsølan og avgreiðslan í 18 ár hevur hildið til í eini stórari høll við gjøgnumtrekki og millum bilar og truckar. - Nú hildu vit, at tíðin var komin til at bjóða kundum okkara hóskandi høli segði Einar Waag, sum tó tíanverri ikki kundi lovað, at tað fór at verða nógv heitari, tí ølið skal jú vera kalt!

Bryggjarístjórin nýtti eisini høvi til at reisa spurningin, hví man fór undir slíka bygging, tá tað hevur verið ført fram av eitt nú landsstýrismonnum, at sølubúðirnar hjá bryggjaríunum skulu stongjast. Hann vísti í hesum sambandi á, at tá einkarsølan kom í 1992, varð ætlanin hjá tí politiska myndugleikarnum at stongja allar ølsølurnar, sum tá høvdu virkað í 12 ár.

- Vit stríddust ímóti hesum, tí vit vistu, at einkarsølubúðirnar ikki høvdu orku til at klára alt ølið og taka ímóti tómum fløskum - og tað eydnaðist tá eftir tógvið stríð at fáa loyvi til at halda fram í 5 ár fyribils. Nú hoyrist so aftur okkurt um at stongja ella flyta sølustøð uttan fyri bygt øki. Eftir okkara metan er einasta alternativ til okkara sølubúðir ein frí søla sum í grannalondunum, men tá hetta eftir tí politiska rákinum ikki sær út til at vera gjørligt, so hava vit bygt nýggja sølubúð fyri at geva kundum okkara eina skjóta og góða tænastu segði Føroya Bjór-stjórin.

Einar Waag takkaði eisini einum av gomlu Føroya Bjór veteranunum, Onnu Petersen fyri dygdargott arbeiði og áhaldni alla ta tíð goymslan og avgreiðslan hevur verið í einum ikki nóg nøktandi umhvørvi.

Søgan hjá Føroya Bjór í Havnini gongur heilt aftur í fimtiárinum, tá ein dani nevndur Råbæk hevði goymslu í býnum. Í 1965 tóku Anna og Martin Petersen við. Tá hevði Anna arbeitt hjá Føroya Bjór síðani 1956. Tey fluttu til Havnar og goymslan var í kjallaranum á Orknoyarvegi fram til umleið 1984. Tá sterka ølið kom á marknaðin gjørdist ov trongligt har, og ikki fyrr enn í 1984, tá grundøki var fingið til vega at byggja á í Akranesgøtu, broyttust umstøðurnar. Høllin, sum varð liðug sama ár, var eitt risaframstig fyri henda føroyska framleiðaran av øli og sodavatni. Anna helt fram eftir at Martin varð farin og gavst hon fyri tveimum árum síðani. Tá tók sonurin Petur við og er hann deildarleiðari har í dag.



*Einar Waag, stjóri í Føroya Bjór saman við Onnu Petersen, sum í mong ár stóð*
*fyri goymsluni og útsøluni saman vi? manninum Martin*

*Mynd Jens K. Vang*




*Nevndarformaðurin Rúni Heinesen saman við Petur Petersen, deildarleiðara, Heina Waag frá høvuðsskrivstovuni hjá Føroya Bjór í Klaksvík og Einar Waag, stjóra*

*Mynd Jens K. Vang*